Vikuskiftis Sosialurin




# Gudstænastan hevur altíð hugtikið meg

**- Tað er sera hugaligt at verða vígdur og innsettur sunnudagin júst her í Kvívík, sigur 31 ára gamli Theodor E. D. Olsen. Eftir at hava lisið til prest tey seinastu árini, er dagurin nú komin at lata seg í nýggju arbeiðsklæði síni: Prestakjólan og kragan**

PRESTAINNSETAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Kvívík:** Tann 104 ára gamla kirkjan í Kvívík verður sunnudagin karmur um hesa heilt serligu hátíðarløtuna.

Við hesa gudstænastuna verður nevniliga tann 31 ára gamli Theodor fyrst prestvígdur og síðani innsettur sum sóknarprestur í Norðstreymoyar prestagjaldi.

Hetta verður ein stór løta fyri tann nýggja prestin, sum nú sleppur til verka. Men løtan gerst ikki minni av tí, at ætt hansara er úr Kvívík.

- Abbi mín hevði telefonstøðina í bygdini, og pápi mín var eisini ættaður hiðani. Og sjálvur havi eg mangan verið her sum smádrongur.

- Jú, hetta verður heilt vist ein serstakur dagur fyri meg, sigur Theodor stillisliga.

Mikudagin var hann á vitjan í prestagarðinum í Kvívík, har hann millum annað varð settur inn í tey meiri administrativu viðurskiftini í starvinum. Í gjár var hann til samtalu við Jógvan Fríðriksson biskup, og sunnudagin verður tann stóri dagurin.

Theodor er settur sum avloysari fyri sóknarprestin Marjun Bæk, sum fer í farloyvi hesa tíðina. Theodor flytur samstundis inn í prestagarðin á Kirkjuteigi at búgva.

## Hugtikin av gudstænastuni

At Theodor nú verður vígdur og síðani innsettur sum prestur undir somu gudstænastu, er ein gamal dreymur sum umsíðir gerst veruleiki.

Hann hevur lisið gudfrøði í Keypmannahavn, men áðrenn hann kom so langt, hevði hann sum barn gingið í skúla í Sankta Frans skúla í Havn.

Her fekk hann eitt gott innlit í, hvussu tann katólski heimurin er skipaður og somuleiðis hvussu fólkakirkjan er skipað. Hann hevur tó ikki, sum kanska onkur annar, spælt prestur tá hann var barn.

- Men eg havi altíð verið hugtikin av gudstænastuni, slær hann fast.

Hetta var eisini ein týðandi orsøk til at hann fór at lesa gudfrøði við ynskinum um einaferð at gerast prestur í fólkakirkjuni.

Nú er dagurin so upprunnin, og sunnudagin verður hátíðargudstænasta í bygdini haðani ætt hansara stavar. Hetta er samstundis fyrstu ferð at ein prestur verður vígdur og innsettur í Kvívíkar kirkju.

## Samstarva við øll

Tað var upprunaliga fráfarni biskupurin, Hans J. Joensen sum spurdi seg fyri hjá Theodori, um hann var hugaður at loysa Marjun av eitt skifti.

Í samráði við kirkjuráðini í økinum og nýggja biskupin, Jógvan Fríðriksson varð avgjørt at seta hann sum avloysara í Kvívík teir næstu tríggjar mánaðirnar, meðan Marjun fer í farloyvi.

Hesa stuttu tíðina skal Theodor røkja allar tær skyldurnar sum ein sóknarprestur eigur at røkja í økinum, og skal haraftrat arbeiða saman við hinum prestunum í Norðurstreymoy – Ingu Poulsen Dam í Vestmanna og Mogens T. Christensen í Hvalvík.

Theodor er opin av lyndi, og fer ikki at hava trupult við at samstarva við prestar og onnur fólk innan kirkjuna.

- Nei, eg kann samstarva við øll í kirkjuni – eisini við uppafturgift og kvinnuligar prestar, slær hann fast.

## Strævin byrjan

Nú hann verður vígdur og innsettur er hann greiður um, at tríggir mánaðir ikki er long tíð at virka sum avloysaraprestur í eini sókn.

- Eg fari í øllum førum at gera mítt besta, soleiðis at alt verður í sama standi sum nú, ið eg fari í hetta starvið.

- Hetta var eitt so spenn-



*Nógv er at seta seg inn í hjá nýggja prestinum. Her fær hann innføring í arbeiðið av Marjuni Bæk, sum hann skal loysa av teir næstu tríggjar mánaðirnar*